**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 155/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi** (Flyta kvotur yvir um ár)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**
(Flyta kvotur yvir um ár)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018, løgtingslóg nr. 162 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 178 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 186 frá 21. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 39, stk. 4, 1. pkt. verður "upp til 10% av egnari árskvotu sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 kunnu flytast" broytt til: "ikki fiskaður partur av egnari árskvotu sambært §§ 14-18, § 28 og § 34 kann flytast".

**2.** Í § 39, stk. 4, 3. pkt. verður "at meiri enn 10% verður flutt millum ár, og" strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri kvotur latnar í 2018 ella seinni.

**Viðmerkingar**

Endamálið við uppskotinum er, at Føroyar skulu gagnnýta tað ríkidømi í havinum, sum okkum er ásett.

Av tí at Høgni Hoydal, landsstýrismaður, drálaði í upp til 9 mánaðir av árinum, áðrenn stórar kvotur vóru útskrivaðar, liggur útflutningsvirði fyri minst 200 milliónir kr. ófiskað.

Serliga eru tað menningarkvotur, har feløg bert fingu 3 mánaðir at koma í gongd. Tað er ein púra høpisleys uppgáva.

Av makreli, sild og svartkjafti eru yvir 50.000 tons, sum í 2018 eru ófiskað. Orsøkina er tað bara landsstýrimaðurin, sum eigur. Tí árið var næstan farið, áðrenn hann útskrivaði loyvini. Harafturat hevur Høgni Hoydal, landsstýrimaður tikið inn aftur kvotur, uttan at lata tær til aðrar.

Bara í menningarkvotum er talan um 48.218 tons av svartkjafti, sum eru ófiskað. Tað er stórt sæð øll menningarkvotan av svartkjafti.

Men eisini av makreli og norðhavssild svimur nógv ófiskað. 3.641 tons av makreli, útlutað sum menningarkvota fyri 2018, er ikki fiskað, og 3.015 tons av norðhavssild av menningarkvotu liggur ófiskað.

Fyri at hetta ikki skal kosta samfelagnum ovurhonds upphæddir, verður skotið upp, at heimilað verður at flyta allar ófiskaðar kvotur yvir um ár. So kunnu ófiskaðar kvotur fyri 2018 fiskast í 2019.

Hendan lógarbroyting heimilar tó ikki øllum flytingum. Í summum førum ber ikki til at flyta kvotur, tí landsstýrið hevur bundi seg í millumtjóða sáttmálum. Uppskotið er generelt, tí sambært § 55 í Stýrisskipanarlógini eru millumtjóða sáttmálar yvir føroyskari løgtingslóg.

Fyri kvoturnar merkir tað, at har millumtjóða fiskiveiðisáttmáli ikki loyvir ella avmarkar flyting millum ár, er tað millumtjóða sáttmálin, sum er galdandi. Her skal tó nevnast, at eingin avtala er um sild og svartkjaft.

**Fíggjarligar avleiðingar.**

Fyri reiðarí og virkir á landi er talan um eitt útflutningsvirði upp á í minsta lagi 200 mió. kr.

Fyri manningar á skipum og fólkið á fiskavirkjum á landi, merkir hetta stórar lønarinntøkur.

Fyri land og kommunur merkir uppskotið ein inntøkuvøkstur í m.a. inntøkuskatti, p/f skatti og eisini í tilfeingisgjaldi. Talan er um 10-tals milliónir í eyka inntøku hjá landi og kommunum.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Við hesari ásetingini verður gjørligt hjá landsstýrismanninum at loyva, at øll ófiskaða eginkvotan í einum ári, kann verða flutt til árið eftir.

**Til § 2**
Gildiskomuregla, sum ger tað møguligt, at ófiskaðu kvoturnar av makreli, sild og svartkjafti í 2018 kunnu verða fluttar yvir um ár, so hesar kunnu fiskast í 2019.

**Á Løgtingi, 7. mars 2019**

Jørgen Niclasen